**21.11.23**

# Starvslýsing:  Avloysara til Kamb á Kambsdali

**Søkt verður eftir:**

Avloysara, ið kann arbeiða skiftandi vaktir og møta við stuttari fráboðan. Lesandi eru eisini vælkomin at søkja.

**Um dagstovnin Kamb:**

Kambur er dagstovnur, ið er staðsettur í náttúruvøkrum umhvørvi á Børkugøtu 2 á Kambsdali, og veitir heildags tilboð til 6 ára gomul børn í Fuglafjarðar kommunu og er frítíðarskúli fyri 1. og 2. flokk. Er ætlaður uml.65 børnum.

Vit liggja í sera góðum náttúru umhvørvi, sum birtir upp undir nógv spennandi virksemi, bæði skapandi og granskandi.

Á Kambi hava vit nógv ymisk bólkavirksemi hvørja viku, har vit leggja dent á tað málsliga og sosiala hjá børnunum. Vit eru dagliga túrar við børnunum, og hava vit fingið jaligar afturmeldingar um, hvussu gott hetta er fyri tey.

**Vit sóknast eftir starvsfólki**

- Sum hevur umsorgan fyri tí einstaka barninum.
- Sum er álítandi, tekur ábyrgd og dugir at seta sær mál.
- Sum er jalig/ur og hevur hug og hegni at samstarva bæði við starvsfelagar, foreldur og børn.
- Sum bæði kann arbeiða sjálvstøðugt og í toymi
- Sum sær møguleikar, ið náttúran hevur at bjóða og sum hevur hug og hegni at brúka hesar møguleikar í arbeiðinum.
- Sum dámar væl at luttaka í uttandura virksemi.
- Sum megnar møguligar broytingar í arbeiðinum
- Sær møguleikar fram um forðingar.

**Vit leggja dent á, at starvsfólkið:**

- Virðir tað einstaka barnið.
- Møtir barninum, har tað er.
- Eru áhugað, at arbeiða við málmenning.
- Eru týðilig og góð at samstarva.
- Hevur hug og hegni at skapa karmar, har børn kunnu brúka teirra hugflog og skapandi evnir bæði innandura og úti í náttúruni.
- Hevur hug og hegni at skapa álit, trivnað og tryggleika bæði fyri børn og foreldur.
- Kemur við nýhugsan og ígongdsetan.

- Má tola møguligar broytingar i starvsinnihaldinum.

**Vit bjóða tær:**

- Eitt spennandi starv, sum er í støðugari menning, har tú kanst vera við at mynda og seta tín dám á stovnin.
- Eitt starv við fjølbroyttum arbeiðsuppgávum og har tú kanst vísa tínar dygdir og samstundis menna teg sjálvan persónliga og fakliga.
- Sparring við námsfrøðingar

**Setanarviðurskifti:**

Starvið, sum avloysari, **verður sett skjótast gjørligt.**

Arbeiðstíðin er mánadag til fríggjadag millum kl. 7.15 og 17.00.

Løn eftir sáttmála millum Føroya Pedagogfelag, Fíggjarmálaráðið og Kommunala Arbeiðsgevarafelagið.

*Sambært § 2 í barnaváttanarlógini hevur stovnurin skyldu til at fáa barnaváttan til vega, áðrenn umsøkjari verður settur í starv.*

Vit gleða okkum at hoyra frá tær.

**Meira fæst at vita um starvið:**

Vilt tú vita meira um stovnin og starvið, kanst tú seta teg í samband við leiðaran á Kambi

Bjørghild Arnholdtsdóttir á tlf. 238092, ella frifugl@fuglafjordur.fo

**Umsókn:**

Umsókn saman við prógvi og møguligum viðmæli/-um skal sendast til:

Fuglafjarðar Kommunu
Í Stød 5,
530 Fuglafjørður

ella umvegis teldupost á info@fuglafjordur.fo. **Umsóknarfreistin er týsdagin 5. desember 2023**.